Bumbuatsókn í London:

# Ongin føroyingur raktur

**Enn er onki frætt um, at nakar føroyingur er saknaður ella hevur fingið skaða av bumbuatsóknunum í London hósdagin. Onkur náddi ikki flogfarið heim til Føroyar eftir ætlan og sendistovan í London hevur fyri tað mesta bert fingið praktiskar spurningar úr Føroyum**

LONDON
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Sambært seinastu tølunum úr London, eru oman fyri 50 fólk deyð og umleið 700 álvarsliga løstað eftir ógvusligu bumbuatsóknina í miðbýnum í enska høvuðsstaðnum í gjár. Føroyski sendimaðurin í London, John Rajani, fylgir neyvt við gongdini, men enn er onki frætt um føroyingar, sum eru saknaðir ella hava fingið skaða av bumbubrestunum. Onkrir fyrispurningar av verið úr Føroyum, men teir hava mest verið av praktiskum slagi.



*Føroyski sendimaðurin í London, John Rajani, fylgi neyvt við gondini eftir álvarsligu bumbuatsóknirnar hósdagin. Enn eru ongar fráboðanar komnar um føroyingar, sum hava verið beinleiðis raktir av bumbuálopunum*

### Ein tungur dagur

Londonbúgvar vaknaðu til ein tungan dag í fríggjamorgunin, dagin eftir álvarsligu bumbuatsóknirnar í enska høvuðsstaðnum. John Rajani, sendimaður í London, greiðir frá, at hóast undirgrundartokini gjørdust marrukendar deyðsfellir hósdagin, vóru tey mong, sum longu aftur gjáramorgunin noyddust at ferðast við undirgrundini fyri at koma til arbeiðis.

- Sera nógv fólk ferðast langvegis frá hvønn dag fyri at koma til arbeiðis inni í London, og tey hava ongan annan møguleika, enn at brúka undirgrundartokini. So tað var uttan iva við piprandi hjarta, at nógv settu seg í tokini í gjár. Nú eru hendingarnar sodnaðar eitt sindur, og á ein hátt er tað nústaðni at ræðuleikarnir ganga upp fyri fólki her í býnum, sigur John.

Sendistovan, har John starvast, liggur nakað burtur frá miðbýnum, so tey merktu ikki nakað beinleiðis til bumbubrestirnar. Men arbeiðið á sendistovuni hevur, sum vera man, verið merkt av hendingunum.

- Vit hava ein lista yvir danir, sum fólk ikki hava hoyrt frá og sjálvandi eru bangin um. Ein orsøk er, at telefonirnar í stórum parti av býnum ikki riggaðu hósdagin, so longu nú styttist listin yvir saknaðar danir tíbetur skjótt, sigur John.

Annars ber alt bjargingararbeiðið dám av at vera framúr væl skipað. John ivast ikki í, at hetta kemst av, at fyri trimum árum síðani gjørdu bretar eina umfatandi tilbúgvingarætlan til ein støðu, sum hesa, tí tað er týðiligt, at tað er hendan ætlanin, sum nú er sett í verk. Samstarvið millum tær ymsu bjargingardeildirnar gongur væl, og sum heild tykjast mynduleikarnir at hava fullkomið tamarhald á støðuni.

### Óvæntað

John heldur, at bumuatsóknin hósdagin kom sum eitt sera stórt sjokk á fólk í Londum, tí á ein hátt høvdu tey flestu ivaleyst eina kenslu av, at vandin var avhasaður. Fyri einum ári síðani vóru nevniliga so nógvar beinleiðis hóttanir um atsóknir í London, at fólk næstan bara bíðaðu eftir, at okkurt fór at henda. Mynduleikarnir sendi hvørjum húsarhaldi vegleiðingar í, hvussu tey skuldu bera seg at í eini tílíkari neyðstøðu, og spurningurin var ikki, um nakað fór at henda men nær. Tað, sum fólk kanska óttaðust mest, vóru hervilig giftálop, men ongin ivaðist í, at undirgrundartokini fóru at verða fyrsta málið.

- Undirgrundarjarnbreytin í London er jú eitt upplagt yvirgangsmál. Stóran part av degnum er hon stúgstappað við fólki, sum lítlan og ongan møguleika hava, at sleppa burtur. Samstundis er hetta, sum sagt eitt ferðasamband, sum sera nógv fólk eru bundin av hvønn dag, bæði til arbeiðis og til at heinta børnini aftaná skúlatíð, sigur John.

Í dag royna fólk so sum frægast at taka gerandisdagin uppaftur. Tað er ikki so nógv annað at gera enn at royna at leggja tað, sum er hent, afturum seg og læra at liva vit óttanum fyri, at slíkt kann henda, sigur John. Hóast tað neyvan ber til at venja seg við hóttanir um bumbuatsóknir av hesum slagi, eru tað nógvir bretar, sum kenna støðuna aftur frá IRA álopum í London gjøgnum tíðirnar. Men burtursæð frá flogálopinum á Lockerby í 1988, er atsóknin hósdagin tann størsta í London í nýggjari tíð.

### Ongin øsing

Hóast nógv bendir á, at muslimskar yvirgangsfelagsskapir standa aftanfyri atsóknina, verður nógv gjørt í bretsku fjølmiðlunum fyri at forða fyri møguligari øsing mótvegis teimum mongu muslimunum í landinum. Politikarar leggja áherðslu á, at ein slík atsókn onki hevur við vanligar muslimar, búsitandi í London, at gera, og at hendingarnar hósdagin ikki eiga at føra til fordøming av einum heilum fólkaslag. Eisini hava fleiri muslimskir leiðarar í London traðka fram og fordømt atsóknina, so fyribils er ongin øsing ella hevndarhugur at merkja í bretska samfelganum, sigur John Rajani, sendimaður í London.

# Hergeir varð evakueraður

Løgtingsmaðurin Hergeir Nielsen endaði mitt í rokanum, tá ið bumburnar brustu í London hósmorgunin. Hann varð undir nógvum meldri fluttur burtur frá jarnbreytastøðini við King's Cross, tá ein bumba brast har

Hergeir Nielsen hevur júst vitjað á Isle of Man í sambandi við setanina av tinginum á Tynwald. Hergeir Nielsen er fyrsti næstformaður í løgtinginum, og tað var tí hann var á almennari vitjan á bretsku oynni.

Á veg heimaftur til Føroya umvegis London endaði hann mitt í ruðuleikanum, tá ið yvirgangsatsóknir vórðu framdar móti enska høvuðstaðnum hósmorgunin.

Hergeir Nielsen var staddur á jarnbreytastøðini við King´s Cross, tá ið ein bumba brast har, og hann varð í ruðuleikanum evakueraður av jarnbreytastøðini.

Løgtingsmaðurin fekk ongan skaða, og hann hevur tað gott.

**ek**

